# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Hondbóltsdómarar fara av landinum

**Tveir dómarar í fremstu hondbóltsdeildunum fara komandi dagarnar av landinum og ein fór fyri einum mánaði síðani. – Vit fara at tosa saman um hetta, men vit hava aðrar at seta í teirra stað, sigur Kristian Johansen, formaður í Hondbóltssambandinum**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Nú hondbóltskappingarnar hjá bæði kvinnum og monnum eru komnar til endaspurtin, verða dómararnir alsamt færri í tali. Innan fyri eina viku eru tvey dómarapør ikki til longur, tí annar dómarin í hvørjum pari fer av landinum, og haraftrat flutti ein royndur dómari av landinum fyri einum mánaði síðani.

Greitt er, at beiggjarnir Kristian og Karsten Joensen úr Klaksvík ikki døma fleiri dystir hetta kappingarárið, tí í vikuni flytir Kristian til Danmarkar. Sum skilst, gevst Karsten samstundis.

Og tá dystirnir sunnudagin eru farnir aftur um bak, er dómaraparið Ragnar Simonsen og Rúni Mohr heldur ikki til taks í teimum báðum seinastu umførunum í Sunset- og Atlantic Airways-kappingunum. Ragnar fer um eina viku fer av landinum í privatum ørindum og verður burturi í tríggjar vikur. Hann kemur ikki aftur fyrr enn 5. apríl, sum er dagin eftir seinasta landskappingarumfarið.

Frammanundan er Hans Thomassen fluttur av landinum, so hann og Hanus Kúrberg ikki longur eru eitt dómarapar, sum er til taks. Síðani Hans flutti niður, hevur Hanus tó havt Hannis Wardum aftur at sær.

### Fleiri skulu døma

Henda brádliga íkomna støðan kemur ikki júst væl við, tí frammanundan er úrvalið ikki alt ov stórt. Kortini er formaðurin í Hondbóltssambandinum vísur í, at dómarar verða til allar teir írestandi dystirnar.

– Hetta er ein nokk so nýggj støða, sum vit fara at tosa saman um nú. Men vit hava nakrar dómarar til taks, sum vit eisini kunnu brúka hesi seinastu landskappingarumførini. So eg síggi ikki so svart upp á tað, sigur Kristian Johansen, ið røkir umsitingina av dómarunum í kappingunum hjá kvinnum og monnum.

– Ragnar kemur aftur áðrenn FM-finalurnar, so har kann hugsast, at hann og Rúni verða at síggja aftur. Birgir Sondum hevur dømt onkrar dystir saman við Thomas Juul Thomsen, umframt at Hannis hevur hjálpt Hanusi. Eg havi enntá sjálvur traðkað til, tá onkrum dómara hevur borist frá.

Kristian Johansen sigur, at tað er ein støðugur trupulleiki, at ov fáir dómarar eru. Men nú fer Hondbóltssambandið at gera nakað við málið, so fleiri kunnu vera til reiðar at døma, tá næsta kappingarár fer í gongd.

– Í august ella september mánaði fáa vit ein danskan instruktør til Føroya, sum fer út til feløgini at leggja lag á. Tað eru jú fyrst og fremst tey, ið mugu taka seg saman, tí tað eru framvegis fleiri feløg, ið als ongar dómarar hava, sigur formaðurin í Hondbóltssambandinum.

– Eitt nú eru eingir dómarar úr tveimum so stórum feløgum sum VÍF og StÍF, og tað ber ikki til. Tí fara vit eisini til komandi kappingarár at seta feløgunum krav um, at tey øll skulu hava dómarar tøkar.



*Kári Hansen og Sámal Paulason døma framvegis, men trý av fimm dómarapørum eru ikki tøk í endaspurtinum, tí annar dómarin skal av landinum*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

# FIFA hóttir skotska landsliðið

**Gera Wales, Norðurírland og Skotland eitt felags landslið við Onglandi til olympisku summarleikirnar í 2012, kann tað fáa álvarsamar fylgjur – eisini fyri Føroyar**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Ger FIFA álvara av ætlanin at beina fyri fótbóltssambondunum í Skotlandi, Wales og Norðurírlandi, verður lítið longur hjá skotsku landsliðsfjepparunum í Tartan Army at fegnast um*

Skotland, Wales, Norðurírland og Ongland hava eina søguliga serstøðu í altjóða fótbólti, tí londini hava øll síni fótbóltslandslið, hóast Bretland formliga er ein tjóð í altjóða viðurskiftum.

Men hendan serstøða er nú undir hørðum trýsti, orsakað av olympisku summarleikunum í London í 2012. Tey, sum skipa fyri leikunum, ganga við einum brennandi ynski um, at Bretland har fer at hava eitt felags fótbóltslið.

Skotar hava tó frá byrjan sagt, at teimum dámar ikki hesa verkætlan. Eins og walisar og norðurírar eru teir bangnir fyri, at FIFA fer at brúka eitt felags bretskt OL-lið sum undanførslu, fyri at leggja niður fótbóltssambondini í Skotlandi, Wales og Norðurírlandi.

Nú boðar eisini skotska fótbóltssambandið frá, at FIFA-forsetin, Sepp Blatter, hevur hótt við at tikið serstøðuna frá teimum bretsku landsliðunum. Hetta hevði ført til, at talan hevði verið um eitt felags bretskt landslið, sum hevði verið dominerað av enskum spælarum.

– Harra Blatter segði við meg til ein døgurða, at um vit blivu partur av einum felags bretskum OL-landsliði, so kom okkara serstøða at vera í vanda. Eg var skelkaður av hesum og hugdi yvir á Lord Triesman og Sir David Richards frá enska fótbóltssambandinum, sum eisini vóru paff, sigur formaðurin í skotska fótbóltssambandinum, George Peat.

Missa atlondini Skotland, Wales og Norðurírland sína serstøðu, er eingin ivi um, at hetta eisini fær fylgjur fyri Føroyar.



## Framskundaðir flogbóltsdystir

Tveir dystir millum Mjølnir og Fleyr í Eikliguni hjá kvinnum og monnum, sum skuldu verða í KÍ-høllini leygardagin, eru framskundaðir og fluttir í Badmintonhøllina í staðin.

Kvinnudysturin er framskundaður til í kvøld klokkan 20, og hóast mansdysturin framvegis verður leygardagin, er hann fluttur frá seinnapartinum til leygarmorgunin klokkan 11.

Somuleiðis er dysturin millum TB og Mjølnir í Eikliguni hjá kvinnum framskundaður frá leygardegnum 14. mars til leygardagin 8. mars klokkan 14.